

*Kyndil kundi minka um munin upp til KÍF, men tók ikki av møguleikanum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Kyndil segði farvæl

**HONDBÓLTUR** Tað var lítið sannlíkt frammanundan, at tað fór at bera til, men Kyndil veittraði einum finaluplássi endaliga farvæl í gjár

Uni Holm Johannesen

VÍF tók av sínum møguleika og livir framvegis í vónini. Kyndil var als ikki til reiðar og tapti greitt og uppiborið fyri hoyvíkingum. Tað var seinasta møguleikin. Kyndil er ikki longur við í stríðnum um finalupláss.

Tað eru bara vestmenningar, sum kunnu hótta KÍF í stríðnum um at spæla finalurnar um FM-heitið móti Neistanum. Kyndil kundi vinna seg tvey stig nærri kollfirðingum í gjár, og tá KÍF er eitt av komandi mótstøðuliðunum, var hugsandi, at Kyndil kundi bíta frá sær. Tað verður ikki støðan.

### Eingin ivi

Gestirnir vóru grammari frá byrjan, og serliga í verjuspælinum stóðu hoyvíkingarnir seg væl, umframt at málverjin Levi Nybo vardi ofta meistarliga fyri. H71 fór undan heimaliðnum beinanvegin, og munurin varð so stórur, at spurningurin, um Kyndil fór at hótta leiðsluna, varð ongantíð reistur. Hinvegin var lítið veiggj í heimaliðnum. Álopsspælið riggaði illa, og verjuspælið var stundum lítið sannførandi. Hoyvíkingar fingu nógv pláss at spæla í.

Dánjal Torgarð, H71, var stórspælandi og toppskjútti við 13 málum.

### Kyndil – H71
21-30 (7-15)

Dómarar: Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen

**10 min.: 1-4**
**20 min.: 5-8**
**40 min.: 12-20**
**50 min.: 18-25**

**Kyndil:** Bárður Johannesen 6, Hans Áki Dal-Christiansen 5, Karl Jóhan Djurhuus 4, Andrias B. Sólsker 3, Hans Arni B. Thomsen 1, Torvald Abrahamsen 1, Kristoffur Kristoffersen 1.
**H71:** Dánjal Tórgarð 13, Bogdan Florea 6, Rógvi Sørensen 5, Esbern Patursson 4, Rúni Højgaard 1, Poul Kjartan Dam.
Útvísingar: Kyndil 8, H71 5.

### KÍF – Neistin
25-31 (14-16)

Dómarar: Kristian Joensen og Karstin Joensen

**10 min.: 3-6**
**20 min.: 6-11**
**40 min.: 19-20**
**50 min.: 22-24**

**KÍF:** Agnar Joensen 7, Ingi Johannesen 4, Regin Petersen 3, Niklas Reginsson 3, Ási Dam 3, Tony Weyhe 2, Rúni Joensen 2, Hans Eli Sigurðbjørnsson 1.
**Neistin:** David Edvardsen 6, Jugoslav Djumic 6, Heini Hanusarson 6, Finnur Hansson 4, Sjúrður Thomassen 3, Rósing Rasmussen 3, Jákup Apol 1, Ingi Olsen 1, Áki Mørk.
Útvísingar: KÍF 10, Neistin 3.

### Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 19 | 669 | 515 | 154 | 37 |
| 2 | KÍF | 19 | 532 | 500 | 32 | 24 |
| 3 | VÍF | 19 | 528 | 489 | 39 | 21 |
| 4 | Kyndil | 19 | 488 | 495 | -7 | 19 |
| 5 | H71 | 19 | 519 | 507 | 12 | 18 |
| 6 | StÍF | 19 | 486 | 504 | -18 | 11 |
| 7 | Team Klaksvík | 18 | 430 | 642 | -212 | 2 |

# Neistin varðveitir spenningin

**HONDBÓLTUR** Tað tykist framvegis ikki at ávirka Neistan stórvegis, at liðið hevur havt lítið og einki at spælt fyri seinastu vikurnar, sæð burtur frá steypafinaluni. Hesa ferð vann Neistin á nærmastu kappingarneytunum

Uni Holm Johannesen



*Mynd: Álvur Haraldsen*

Neistin gjørdi sítt til, at tað framvegis er spenningur í stríðnum at røkka finalunum um føroyameistaraheitið. Neistin vann oddadystin á KÍF, og samstundis sum vestmenningar koppaðu StÍF eru tað trý stig sum skilja ovastu liðini.

Neistin hevur lítið og einki at spæla fyri, og tað eru mest sum bara við týdningarleysum venjingardystum, sum næstu landskappingardystirnir í grundini eru, at steypavinnararnir fyrireika seg til finalurnar um føroyameistaraheitið.

### Fylgdust leingi

Liðini fylgdust fyrstu løtuna, men Neistan hevði stundum lítla yvirvág. Steypavinnararnir fingu tvey mál seinastu løtuna í fyrra umfarinum, og var tvey mál framman fyri í hálvleikinum.

Tað vóru serliga málverjarnir, sum vóru eyðsýndir. Í fleiri førum áttu teir høvuðsleiklutin. Óla Kristian Djurhuus, KÍF, sum loysti av skadda Emil Dam, og Ári Dam, Neistin, syrgdu fyri, at annað liðið ikki fór til stroks og undan hinum. Miðskeiðis í seinna hálvleiki settu gestirnir ferðina upp, og tá skrædnaði millum liðini. Neistin vann uppiborið 31-25.

KÍF fekk ikki færri 10 útvísingar í gjár. Tað ber boð um eitt stríðshuga lið, men 10 útvísingar darva spælinum nógv. Tað gav eisini Neistanum fyrimunir, sum steypavinnararnir gagnnýttu. Heini Hanusarson, David Edvardsen og Jugoslav Djumic vóru hesa ferð mest eyðsýndir í álopsspælinum og skutu seks mál hvør fyri Neistan.

*uni@sosialurin.fo*

# VÍF loysti fyrstu uppgávuna

**HONDBÓLTUR**
**Treytirnar eru greiðar. VÍF skal vinna dystirnar, sum resta í, og KÍF skal snáva í øllum førum tvær ferðir afturat. Vestmenningar loystu fyrstu uppgávuna í gjár**



*Mynd: Álvur Haraldsen*

Uni Holm Johannesen

Tað er ikki serliga sannlíkt, men VÍF livir í vónini. Vestmenningar eru nú trý stig frá at røkka finaluplássinum. VÍF vann á StÍF á heimavølli í gjár, og KÍF tapti fyri Neistanum. Fimm dystir eru eftir, 10 stig eru eftir at spæla um. Nú skal røkka ella støkka hjá VÍF.

### Avgjørdu seinastu løtuna

Liðini løgdu varisliga fyri, men VÍF hevði munin allatíðina. Tað skrædnaði hinvegin ongantíð millum liðini, tí munurin var ongantíð meira enn tvey mál. Gestirnir vunnu seg upp undir liðina á VÍF stutt fyri hálvleik, og StÍF vann seg beinanvegin framum í seinna hálvleiki. Strandingar vóru eitt skifti á odda við heili fimm málum, men so svaraði heimaliðið aftur. VÍF fekk seks mál upp í slag og kom á odda 24-23. Gestirnir høvdu fleiri upplagdar møguleikar seinastu minuttir at vinna seg aftur í dystin, men heppið. Endaliga úrslitið var 27-25.

VÍF skal spæla móti oddaliðnum Neistanum næsta vikuskiftið, og tá verður helst staðfest, um vestmenningar hava møguleika at vinna seg í finaluni. Tapa vestmenningar, og KÍF vinna á Team Klaksvík er munurin aftur fimm stig. Tað verður ov nógv.